
tungutalu tilbiðjan. Og mong okkara hava eitt fornemmilsi, sum so ofta fyrr, at nakað nýtt er við at taka seg upp. Hetta skapar „forventning“, sum vit syngja, og væntanin er at merkja enn størri opinbering av dýrd Harrans. Tú merkir reinleikan og rættleikan, og vit samlast í vissuni um, at hetta er Gud, okkara faðir.

Es. 40.5 sigur: Dýrd Harrans skal opinberast, og alt hold skal fáa tað at síggja. Og vit fáa loyvi at uppliva, at profetorðið er vorðið til veruleika. Tað eru so nógv lyftir í Gl. Testamenti, sum peika á Messiastíðina, sum var Jesu lív á foldum, og víðari ført til okkum við Heilaga Andanum. **Es. 43.18-19: Hugsið ikki um hitt farna, leggið einki í tað, sum áður var! Nei, nú skapi Eg nýtt, longu nú vísir tað seg – síggja tit tað ikki? Eg skal gera veg í oyðimørkini, áir í landinum, sum oyðið var.**

Áðrenn Heilaga Andans úthelling var andans lív ein oyðimørk, men Heilagi Andin er livandi vatnið, sum vætir jørðina = mannaættina. **Es. 44.3: Tí Eg skal hella vatn yvir hitt tysta, streymar yvir hitt turra; Eg skal úthella Anda Mín yvir børn tíni og signing Mína yvir avkom títt**. Hetta er so stórt og veruligt, at vit mugu rópa: Halleluja.

Okkara land og fólk eiga hesi lyftir, og sannleikin er, at hetta livandi vatnið rennur í Føroyum í dag. Ofta er okkara menniskjansligi hugburður, at vit bíða eftir, at Gud fer at koma, men ístaðinfyri at bíða eftir, at Gud sendir



Heilaga Andan yvir Føroyar, so mugu vit stilla okkum fram, tí vit eru tað livandi vatnið og vit eru hesin „mægtig vind“ sum sangurin sigur. Frá Guds síðu er alt fullgjørt, og vit hava fingið lut í endurføðing Andans og dópi Heilaga Andans, so alt Føroya land skal merkja uppfylling av, at andaliga oyðimørkin er vatnað við livandi vatni og Vegurin í oyðimørkini eitur Jesus. Hetta er Andans opinbering til okkara, so vit ikki liggja undir kenslum og umstøðum, sum ofta fáa okkum at vera niðurboygd.

So at enda vil eg heita á okkum øll, at hvørja ferð vit hava storm í Føroyum, so latið okkum verða mint á, at vit eru Andaligi stormurin, sum blæsir yvir okkara tjóð.

Eg signi teg til at liva í hesum, og at vit í felag uppfylla profetorðið til okkara tíð.

tj

Filadelfia

„Himmal á jørð“

Andin blæsir hagar Hann vil!

Nú øll hesi mongu lágtrýstini blása yvir land okkara, kom eg at hugsa um eitt kór, vit sungu eitt mánakvøld í oktober: Som en mægtig vind kommer Guds ånd, fylder atmosfæren med renhed. En ånd af forventning fra Himmelen, gi'r os åbenbaring om Guds vilje for os.

Tá vindur blæsur í stormstyrki, tá merkist tað um alt landið, og tá Heilagi Andin blæsur yvir Guds fólk, tá merkist tað so sanniliga eisini. Vit hava merkt støðugt Andans virksemi við Guds nærveru á fundum okkara, og støðugt hava vit ákalla: Meira!!!

Tað er vælkent eftirhondini, at okkara DNA er Guds nærvera og opinbering av Harrans dýrd millum okkum. Tessvegna fyllir lovsangur og tilbiðjan almikið tá vit koma saman. Mær dámar so væl útsøgnina: Som en mægtig vind kommer Guds Ånd; og tað merkja vit nógv til, tá vit samlast, og tað fantastiska er, at tað kennist „Som en mægtig vind“ í djúpastu kvirru eins væl og í brúsandi



NOVEMBER 2026

Sunnudagur	1.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbróting**
		Kl. 11.30	**Barnamøti** Møti- og kaffivertar: Hans, David og Óluva Ábyrgd/Leiðari: Tummas J. Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II Uppvørpa: Ljóðbland: Tulkur: Talari: Wayne Simmonds
Mánadagur	2.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd: Tummas J.
Mikudagur	4.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
		Kl. 18.30	**Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Leygardagur	7.		**Reingerð:** Anna-May
Sunnudagur	8.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbróting**
		Kl. 11.30	**Barnamøti** Møti- og kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild Ábyrgd/Leiðari: Anfinn N. Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I Uppvørpa: Jóel Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Regin
Mánadagur	9.	Kl. 19.00	**Felags bønarmøti í Filadelfia** Ábyrgd: Mariann
Mikudagur	11.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Leygardagur	14.		**Reingerð:** Nomi
Sunnudagur	15.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbrót.**
		Kl. 11.30	**Barnamøti** Møti- og kaffivertar: Gerd, Anfinn og Fríðbjørn Ábyrgd/leiðari: Tummas J. Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Ása O.
Mánadagur	16.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd: Anfinn N.
Mikudagur	18.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
		Kl. 18.30	**Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Leygardagur	21.		**Reingerð:** Karin
Sunnudagur	22.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbróting**
		Kl. 11.30	**Barnamøti** Møti- og kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður Ábyrgd/Leiðari: Anna Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I Uppvørpa: Jóel Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Einar
Mánadagur	23.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd: Ása O.
Mikudagur	25.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Hósdagur	26.	Kl. 20.00	**Hugnaløta fyri kvinnur og ungar gentur** Ábyrgd: Margreth og Linda
Leygardagur	28.	Kl. 19.00	Reingerð: Áshild
Sunnudagur	29.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbróting**
		Kl. 11.30	**Barnamøti** Møti- og kaffivertar: Hans, David og Óluva Ábyrgd/Leiðari: Ása O. Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Alex
Mánadagur	30.	Kl. 20.00	**Lovprísan og forbøn** Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

Samkomuleiðslubólkurin